LM-099/2023

Fylgiskjal 52

Saksun 21/02-2024

Uttanríkis og vinnumálaráði
Tinganes
Postrúm 64
Fo 100 Tórshavn

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu

Skal byrja við at siga at vit taka ikki undir við lógaruppskotinum.

Saksun er lítil bygd við 11 íbúgvum. Saksun er ein útjaðari í meginøkinum og hevur eins og útjaðarar annars, verið í afturgongd í mong ár.
Enn er Saksun ein livandi bygd við búsitandi fólki og hvønn dag legst afturat tí, sum er Saksunar søga.
Seinastu árini hevur ein ov stór ferðavinna gjørt lívið verri í Saksun. Men av tí at rættindini hava ligið hjá jørðini, hevur verið møguligt at fyribyrgja at støðan var gjørd munandi nógv verri og vit hava møguleikar at skipa góð proffesionel ferðavinnutilboð, men orsakað av politiskari óvissu, hevur hettar ikki verið gjørt.
Um vit ímynda okkum hvussu støðan hevði sæð út um hendan lógin var komin ígjøgnum fyri nøkrum árum síðani, so er als einki at ivast í, at tann sermerkti dámurin, ið er atdráttarmegin fyri ferðafólk í Saksun, hevði verið skalað alvorliga. So vildu vit í dag havt minst 11 fleiri summarhús í bygdini (ferðavinnuætlan hjá Barbaru Holm og Sunda kommunu). Vit høvdu eisini havt eitt stórt "trailsentur" og stór bøvídd vildi verið løgd undir asfalt til parkeringspláss (ætlan hjá Sunda kommunu).

Marknaðarføringin av staðnum hevði ikki hildið seg aftur og tað hevði verið frí atgongd fyri allar vinnuligar ferðavinnuaktørar at brúka økið akkurát sum teimum lysti uttan møguleikar fyri at nakar ágóði fall lokalt.
Úrslitið av hesum hevði uttan nakað ivamál verið, at seyðhaldið hjá okkum, ið er Føroya stórsta vinnuliga eind, hevði verið niðurlagt saman við teimum ferðavinnutilboðum vit í dag hava, og fólkatalið hevði minka við minst 5 fólkum, ið er okkara húski. Harvið hevði miðalaldurin í bygdini farið upp í uml. 70 ár og eingin vón fyri framtíðar lívi í bygdini hevði verið eftir. Saksunar søga sum livandi bygd hevði verið liðug.

Endamálsorðingin í lógini leggur upp til útjaðaramenning og at inntøkur skulu fella lokalt, men í veruleikanum snýr uppskotið seg um at taka burtur møguleikan fyri lokalum inntøkum og flytir ræðið av bygd í bý.

Uppskotið er einki annað enn øvugt útjaðaramenning og fer at føra við sær meira mistrivnað og avtofting.

Skal annars skoyta uppí, at vit vita væl, at hettar hoyringssvarið fellur fyri deyvum oyrum í umsitingini.

LM-099/2023

Lógaruppskotið byggir nógv á álit á mynduleikarnar, men sjálv tilgongdin til hettar lógaruppskotið hevur knúlva burturav tað seinasta lítla álit, ið hevur verið eftir til almennu Føroyar.

Lógaruppskotið um "burðardygga ferðavinnu" er smíðað í innasta ringi av politiskum rotinskapi og korruptión sum útgerð tey persónligu sambond sum umgirða maktfullu persónarnar sum hava leiðsluna í Visit Faroe Islands. Mín vón er bara at tað eru at sær komin løgtingsfólk sum klára at halda kavrotin og korrupt aðalráð og almenn partafeløg uppá sítt pláss.

Víst verður annars eisini til hoyringssvar frá Bóndafelag Føroya.

Vinarliga

Jóhan Jógvansson og Sonja Dalsgaard Nolsøe
Bóndur í Dúvugørðum í Saksun